

» Tað er ikki kommunan, sum hevur funnið upp á dagtilhaldið fyri minnisveik, men vit eru fegin um at kunna ganga slíkari áheitan frá borgarunum á møti

HERIT MAGNUSSEN

# Dagtilboð til minnisveik í Vestmanna

**- Eitt slíkt tilboð gevur minnisveikum nakað at fara til, samstundis sum tað léttir um hjá teimum avvarðandi, sigur Herit Magnussen, forkvinna í trivnaðarnevndini hjá Vestmanna kommunu**

Vilmund Jacobsen

Avvarðandi at minnisveikum í Vestmanna hava heitt á kommununa um at geva pláss fyri onkrum tilboði til minnisveik sum búgva heima.

Herit Magnussen, forkvinna í trivnaðarnevndini hjá Vestmanna kommunu, fegnast um, at eitt avlastingartilboð, sum tað eisini kann rópast, nú kemur í gongd fyrsta dagin.

– Tað er ikki kommunan, sum hevur funnið upp á hetta, men vit eru fegin um at kunna ganga slíkari áheitan frá borgarunum á møti.

Hon sigur, at sambýlið í Vestmanna verður karmur um hetta tilboð, sum minnisveik kunnu brúka nakrar tímar einar tvær ferðir um vikuna.

og síðan koma minnisveik sjálvi at rinda eitt symbolskt krónutal hvørja ferð, tey fáa høvi at koma á sambýlið.

Herit Magnussen fegnast eisini um, at sambýlið hevur tikið so væl ímóti hesi ætlan – og at tey duga at síggja nakrar møguleikar í, at minnisveik saktans kunnu geva búfólkunum á sambýlinum nakað.

– Tey, sum arbeiða á sambýlinum, eru spurd, hvat tey siga til eina slíka ætlan, og eg fegnist um, hvussu positiv tey hava verið.

Hon vísir á, at tað eru minni enn so øll minnisveik, sum eru illa fyri likamliga.

– Summi eru væl fyri, og hetta eru ofta gemytlig fólk, sum duga væl at siga frá, og sum soleiðis kunnu geva húsinum nakað, leggur Herit Magnussen aftrat.




*Minnisveik, sum annars búgva heima, fáa eitt tilboð, og tey avvarðandi fáa eitt andarhol*

## Royndarætlan

– Kommunan hevur sett nakrar krónur av til eina royndarætlan,

## Tvær síður

Eitt er, at minnisveik soleiðis fáa eitt tilboð og ein avveksling í ger-

andisdegnum. Annað er, at avvarðandi at hesum fólkum, sum búgva heima, eisini fáa eitt andar-

hol, tí tað er mangan strævið hjá familju ella hjúnarfelaga hjá minnisveikum at fáa dagin at hanga

saman.

– Við atliti til fólk, sum hava verið til umlætting á eldrasambýlinum,